# Einki er sum ein góð sig

**- Do you have a cigarette?, er fyrsti spurningur frá russiska sjómanninum her umborð á “Kapitan Butrimov”. At liggja bundin við bryggju ímóti sínum vilja, er ikki stuttligt, tá einum dámar sjólívið. Eingin maður klagar kortini. Teir gleða seg bara at sleppa til fiskiskap aftur. Tað er helst so sum skiparin umborð, Victor Makarov sigur tað so rámandi: - Tá vit fiska er fortjenastan góð. Men tað eru eingir pengar í at liggja við bryggju!**



RUSSAR

*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Ánirnar:** Tað er ógvuliga friðarligt her á havnalagnum um middagsleitið í gjár. Tað er í arbeiðstíð, men einki sæst til fólk, fæ ella før.

Framman fyri “Kapitan Butrimov” er sama støðan. Ikki eitt menniskja at síggja. Leytarin hongur tó niður ímóti bryggjuni, og her er eingin sum forðar nøkrum í at sleppa umborð.

Eg havi gjørt avtalu við skiparan, Victor, at práta við hann um middagsleitið. Tað er tó ikki vist, at samrøðan okkara millum verður til nakað. Tá eg spurdi meg fyri mikudagin, helti hann á bæði borð: - Eg veit ikki, hvat eg skal siga. Eg veit heldur ikki, um tú fært nakað burtur úr. Eg veit ikki ....

Sum ein treiskur tíðindamaður góðtekur ein ongatíð eitt nei fyri eitt nei. So hví ikki royna. Ein fær so ikki annað enn eitt “njet”!

“Kapitan Butrimov”, ið varð bygdur í 1990, er ein stórur verksmiðjutrolari, so tað er høgt av bryggjukantinum og upp á dekkið. Heldur ikki her er nakar sjómaður at síggja. Ein hurð stendur tó opin, og einastaðni har inni hoyrist mannamál. Á skottinum standa ymisk uppsløg á russiskum, men hetta er sum volapyk fyri tann ókenda.

Inni í einum av kømrunum eru nakrir av manninigini savnaðir. Prátið gongur so listiligt, og tað er líkt til at teir hugna sær.

Teir hoyra, at her er fremmant fólk komið umborð. Teir skunda sær allir út, fyri at vita hvør hesin fremmandi er sum er komin á gátt.

### Gott suppukjøt

Inni á kamarinum er tronligt, men hvat sakar tað, tá ein er í sama báti:

Allir bíða teir eftir at sleppa til fiskiskap aftur. Á borðinum stendur orsøkin, til at teir eru savnaðir her og til at lagið er so gott.

- Police?!, vil ein teirra fyrst hava at vita. Teir óttast helst, at “lovens lange arm” vil hava eitt orð við teir. Nei, tá man vera frægari at tosa við eitt tíðindafólk.

Onkur teirra hevur gjørt seg serliga góðan vin við kokkin, sum hevur sett ein tallerk við kókaðum kjøti fram fyri teir. Hetta dámar teimum, tí tað er ikki leingi, so er tallerkurin tómur.

- Halt teg bara framat, sigur ein teirra á hampiligum enskum máli. - Fært tú tær ikki nú, so verður einki til tín um eina løtu. Hetta er tað besta eg veit!

Tíð er bert til at hyggja eftir kjøtinum, tí nú kemur skiparin. Tað skilst á øllum brøgdum, at hann fegin vil hitta umboðið fyri tíðindatænastuna.

- Kom við mær. Vit fara upp á skiparakamarið!

### Kona og børn

Skiparakamarið er ikki prangandi á nakran hátt. Og tó - tað er helst ikki hvørjum skipara beskorið at hava tríggjar telefonir, teldu og fax á kamarinum.

Aftanfyri hann hongur, sum myndin eisini vísir, russiska flaggið omanfyri eitt skipsróður. Á einum øðrum veggi hongur ein hitamálari, ein mynd av einumhvørjum russiskum halgimenni og ein seðil, ið skal minna hann á okkurt. Og á borðinum liggur ein fjarstýring, ein roknimaskina og annað sum ein skipari bara skal hava, til tess at útinna starv sítt.

- Eg tosi ofta við konuna, - einar tvær ferðir um vikuna. Nei, hon er ikki óttafull, so leingi vit liggja við bryggju í Føroyum.

Heima í Ruslandi eigur Victor eisini tveir synir - annar er 15 ár og gongur í ungdómsskúla, meðan tann 22 ára gamli og eldri bróðurin, er í ferð við hægri lestur í Kalingrad.

Síðst, men ikki minst er tað konan, Tatyana. Hon segði manninum farvæl í november, og fær hann, um rætt verður atborið, fyrst at síggja aftur 1. mai. Tá fer trolarin á sleipistøð annaðhvørt í Letlandi ella Polen.

- Tatyana, hon bíðar eftir mær. Eg hopi, at eg skjótt sleppi heim, - ella til fiskiskap. Annað tað. At liggja bundin við bryggju, er einki lív.

### “Sad story”

- Ja, var tú komin umborð í farnu viku, so høvdu vit verið 22 mans. Nú eru vit bara 20 - men tað eru altso 20 góðir menn, vit hava umborð, sigur hann.

Honum stendur greitt, at fólk í landi eisini hava hoyrt ta syrgiligu søguna um tveir av hansara skipsmonnum, sum fyrst endaðu í varðhaldinum og síðani vórðu vístir av landinum.

Greinin í Sosialinum mikudagin við heitinum “Útvístir fyri at stjala mat”, segði greitt frá lagnuni hjá hesum báðum monnunum, ið høvdu ognað sær vørur og annað úr handlum í Klaksvík, og sum teir altso ikki høvdu goldið fyri.

- “Sad story”, heldur skiparin fram.

Vanliga eru teir 64 mans umborð, tá teir eru til fiskiskap. Men síðani skipið varð noytt inn í føroyska havn, er manningin so líðandi farin heimaftur.

Teir 20, sum nú eru umborð royna, sum frægast at fáa gerandisdagin at ganga.



*Russiski trolarin hevur ligið bundin við bryggju í Ánunum í meiri enn ein mánað. - Vit ynskja bara at loysa frá bryggju og sleppa til fiskiskap!*

> *Onkur teirra hevur gjørt seg serliga góðan vin við kokkin, sum hevur sett ein tallerk við kókaðum kjøti fram fyri teir. Hetta dámar teimum, tí tað er ikki leingi, so er tallerkurin tómur*